# Musikkskúla Miðnám – eitt tilboð til evnaríkar næmingar

TÍÐINDASKRIV



Umsóknarfreistin at søkja um upptøku á Musikkskúla Miðnám á Tórshavnar Musikkskúla er 15. mars 2009.

Musikkskúla Miðnám er ein 3-ára fyrireikandi undirvísing til hægri lesnað innan tónleik. Fyri at koma inn á útbúgvingina, skal umsøkjari til upptøkuroynd, og bert tey, ið vísa serstøk evni innan tónleik, verða tikin inn.

Musikkskúla Miðnám er á Tórshavnar Musikkskúla. Øll kunnu søkja um upptøku. Tað er ikki neyðugt at vera næmingur á Musikkskúlanum frammanundan, og er hetta eitt tilboð til tónleikarar úr øllum Føroyum.

Tvær breytir eru, ein rútmisk og ein klassisk. Á Musikkskúla Miðnámi verður undirvíst í flestu vanligu ljóðførum, tónasmíði og sangi. Upptøka er treytað av, at skikkaður lærari er til lærugreinina.

Upptøkuroyndirnar eru í mai mánaða. Royndin er skipað soleiðis, at umsøkjari framførir á egnum ljóðføri, umframt vegleiðandi roynd í teori/hoyrulæru og klaveri. Fyri rútmiskar umsøkjarar er eisini improvisatión og samanspæl.

Næmingar á Musikkskúla Miðnám skulu møta eini 10 tímar um vikuna til undirvísing, umframt venjing heima við hús. Atlit verða tikin til einstaka næmingin, so skúlagongd ella arbeiði sampakkar við lesnaðin á Musikkskúlanum.

Útbúgvingin kostar kr. 2.000,- um árið. Eingin útbúgvingarstuðul er til útbúgvingina.

Meira fæst at vita um útbúgvingina við at fara inn á heimasíðu Tórshavnar Muskkskúla: www.tm.fo/midnam Eisini ber til at venda sær til samskiparanar á Musikkskúla Miðnámi umvegis heimasíðuna.

Umsøkjarar skulu útfylla umsóknarblað, ið fæst á heimasíðu skúlans.

Kunnandi fundur um útbúgvingina verður á Musikkskúlanum á Frúutrøð hóskvøldið 12. mars kl. 19.00

*Tórshavnar Musikkskúli*

# Hvat hevur Søren Kierkegaard at siga okkum í dag!

**Mánadagin kemur kendi danski sóknarpresturin og Søren Kierkegaard kennarin, Anders Kingo til Føroya. Hann fer at halda fyrilestur um Søren Kierkegaard í Norðurlandahúsinum týskvøldið, mikukvøldið fara hann og Jógvan Fríðriksson, bispur at tosa um Søren Kierkegaard og hansara verk og tankar og hóskvøldið vitjar hann á Klaksvíkar bókasavni.**

PRESTAVITJAN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Anders Kingo er í ætt við tann í Føroyum vælkenda Thomas Kingo (1634-1703), sum eitt nú tjørnuvíkingar enn - bæði væl og virðiliga - klára at " toga úr hvørjari lykkju", so segði Pól F á sinni.

Anders Kingo er 53 ára gamal og prestlærdur. Hann er føddur í Løgumkloster, studentur frá Struer, cand. theol. frá Århus Universiteti í 1983 og dr. theol í skrivligu avrikunum hjá Søren Kierkegaard frá Københavns Universiteti í 1995, og hann er nú sóknarprestur í Ullerup kirkju.

Anders Kingo er vituliga ein kennari av S. Kierkegaard. Og hevur skrivað eina røð av greinum og fleiri bøkur um Søren Kierkegaard (1813-1855).

Anders segði – í samrøðu við Kristeligt Dagblad í einum ávísum sambandi – seg vera ein vanligan evangeliskan-lutherskan sóknarprest, ið ikki kendi seg , so at siga, bundnan av sonevndum ávísum rætningum innan kirkjuna, so sum: tidehvervskan, grundtvíkskan ella missiónskan, men at tær ymsu kirkjuligu kósirnar kundu kenna seg tryggar við ta leið, sum hann stóð fyri.

Um avbjóðingarnar hjá tí kristnu kirkjuni í dag, segði hann, at tær eru somu, sum tær altíð hava verið, nevniliga: At tala evangeliið inn í tíðina, ímóti tíðini og á tungumáli tíðarinnar.

Anders er vælupplagdur talari og ikki sjálvhátíðarligur. Sum dømi um hetta seinasta stendur á heimasíðu hansara hetta skoðsmáli frá einum 5 ára gomlum garpi: "Det er præsten, der bestemmer, når man skal graves ned. Han sender nogle på plejehjem, og så graver han dem ned, som bliver til overs." Anders, 5 ár

Anders Kingo verður at hoyra í neðra í nýggja skálanum í Norðurlandahúsinum nú týskvøldið 10. mars kl 19 um júst evnið: Søren Kierkegaard.

Eisini verður Anders Kingo at hoyra í Miðlahúsinum í samrøðu við Føroya biskup, Jógvan Fríðriksson, mikukvøldið 11. mars kl. 19 um evnið:" Hvat hevur Søren Kierkegaard at siga okkum í dag?". Tá verður eisini høvi at seta spurningar.



Anders Kingo verður eisini at hoyra í Býarbókasavninum í Klaksvík, hóskvøldið 12. mars kl. 19 - eisini við Søren Kierkegaard sum evni.

Anders Kingo fer so eisini at vera saman við føroyskum prestum mánadagin.

## Toymið á Psykiatriska Deplinum heiðrað í Danmark

TÍÐINDASKRIV

Psykiatriski deplinum hevur gjøgnum seinasta árið verið við í eini umfatandi verkætlan nevnd "Avvarðandi í psykiatriini". Tað er deild 2 á deplinum, sum hevur luttikið í hesi verkætlan, og føroyska toymið er eitt av 18 toymun í danska kongaríkinum. Endamálið við verkætlanini er at bøta um samstarvið við avvarðandi, sum ein nartúrligan og viðurkendan samstarvspartnara í viðgerðini av sálarsjúkum á deplinum.

Team Tórshavn, sum umfatar starvsfólk á deildina og deplinum, luttekur í hesum døgum á serligum læringsseminari í Danmark, og hava í gjár vunnið fyrsta prísin og viðurkenning fyri avrikini, tá stýrisbólkurin sum hevur ábyrgdina fyri verkætlanini og er samansettur av fakfólkum og brúkaraumboðum í Danmark tók sína avgerð. Avgerðin er tikin útfrá ávísum krøvum. Toymið hevur gjørt eina plakat, sum lýsir prosessina í arbeiðinum við avvarðandi. Sambært formanninum í "Bedre psykiatri" varð mælt til at plakatin bleiv hongd upp á deildum og stovnum í øllum kongaríkinum. sum hugkveikjari til fakfólk og avvarðandi. Arbeiðið í verkætlanini hevur verið til at gjørt eina hugburðsbroytan millum starvsfólk. Toymið hevur systematiskt skjalfest innsatsin og hevur arbeitt við at breiða út vitanina. Tað seinasta kravið, sum var valt útfrá, er tann eldhugi sum Team Tórshavn hevur víst í prosessini, og síðst men ikki minnst, tað vælvild, stuðul og áhuga leiðslan hevur víst prosjektinum.

Team Tórshavn hevur samstarva við avvarðandi, sum hava verið við í gongdini. Hesar lívssøgur hava verið sera mennandi og gevandi fyri arbeiði. Í nærmastu framtíð verður eitt avvarðandi toymi sett á stovn á Psykiatriska deplinum, sum víðari skal skipað arbeiði við avvaraðandi á Psykiatriska deplinum.

Sum heild má sigast, at tað hevur verið eitt sera gott og gevandi samstarv millum starvsfólk, toymi, avvarðandi og leiðslu, deplinum og fólki at gagni. Team Tórshavn sendir eina stóra tøkk til øll, serstakliga avvarðandi sum hava viðvirka.

## Faroe Petroleum gjørt avtalu við norskt felag

TÍÐINDASKRIV
*5. mars 2009*

Avtala gjørd við Spring Energy um norsku loyvini PL405 og PL405B

Faroe Petroleum boðar frá, at avtala er gjørd við Spring Energy um 15% av norsku loyvunum PL405 og PL405B.

Felagið varðveitir 15% av loyvunum. Avtalan inniber, at Spring Energy rindar ein part av kostnaðinum hjá Faroe Petroleum í fyrsta brunninum á loyvunum.

Avtalan er partur av strategiini hjá Faroe Petroleum um at selja partar av loyvum, og á tann hátt minka um boriútreiðslurnar hjá felagnum, men samstundis varðveita ein týðandi part av loyvunum.

Faroe Petroleum fekk loyvini í APA loyvisumførunum í Noregi í 2006 og 2007. Fleiri prospektir eru á loyvunum.

Avtalan við Spring Energy er treytað av, at norsku myndugleikarnir og hinir loyvishavararnir góðtaka avtaluna, og at avgerð verður tikin um at bora ein brunn á loyvunum.

Faroe Petroleum, sum nú eigur 23 norsk loyvir, heldur fram við at leita eftir nýggjum møguleikum í Noregi, samstundis sum at minka verður um kostnaðin við avtalum, so sum tann við Spring Energy. Faroe Petroleum luttekur í løtuni í tveimum norskum boringum.

Tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins (www.fp.fo)